# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tey ósjónligu – eingin politikari til Khader-fyrilestur

Í síðstu viku vitjaði danski fólkatingsmaðurin Naser Khader í Føroyum, og helt hann sera áhugaverdan og viðkomandi fyrilestur í Miðlahúsinum. Khader er ikki hvør sum helst, hann er altjóða viðurkendur serfrøðingur í fólkaræðiligum málum og integratiónsmálum. Hann kom til Danmarkar sum ellivu ára gamal úr Sýria við palestinskum bakstøði og er útbúgvin cand. polit. Hann er sostatt nakað av einum mynsturbrótara, og er kendur sum ein klókur og virdur luttakari í almenna orðaskiftinum úti sum heima. Undir Muhammedkreppuni tók eina djarva støðu og hevur síðan livað við fastari politiverju, tí yvirgangskroppar liggja honum eftir lívinum.

Ein skuldi trúð, at ein slíkur persónur hevði áhuga hjá ikki bert einum breiðum almenningi men eisini hjá teimum, ið umboða almenningin. Vit hugsa um okkara fólkavaldu. Ikki ein tann einasti tingmaður ella landsstýrismaður so frægt sum hirdi at møta til fyrilestur Khaders. Her var so enn eitt dømi um tann trótandi áhuga fyri demokratiskum orðaskifti, sum tíverri sermerkir okkara politikkarar. Her sóu vit enn eitt dømi um ta líkasælu, ið eyðkennir okkara fólkavaldu! Vitjan Khaders var eitt einastandandi høvi at kunna seg við nakrar grundleggjandi spurningar og trupulleikar, sum við fullari ferð eru á veg inn í samfelag okkara, spurningar, ið eru frammi í umheiminum. Men sum vanligt við týðandi almenn tiltøk, har ein skal kunna rokna við, at politikkarar møta upp við eini meining, taka lut og markera, at vit eru eitt vælvirkandi fólkaræði, ella bara lurta um ikki annað, ja, har vóru okkara politikkarar ósjónligir. Bert nøkur av teimum vanligu glepsunum í firtnum lesarbrøvum.

Hvat er hetta fyri nakað? Er hetta likasæla ella bara heimføðisskapur? Arrogansa? Ótti fyri tí fremmanda? Er hetta tann tíverri alt ov vælkenda "Tað skal eingin koma her og siga okkum nakað" støðan? Vit búgva her og tí vit vita best! Ella bera tey ósjónligu boð um eitthvørt uppaftur meira ódámligt? Var hetta bert enn eitt dømi um ta líkasælu við alt, ið ikki gevur atkvøður, ið tíverri í alt ov stóran mun eyðkennir okkara fólkavaldu?

Øll, sum vóru til fyrilestur Khaders, eru samd um, at hann var óvanliga áhugaverdur og viðkomandi at lýða á. Tað er tí ikki sørt harmiligt, at væntandi áhugin og vælkenda líkasælan, sum tykist eyðkenna flestu av okkara politikkarum enn einaferð er komin til sjóndar hjá teimum ósjónligu. Vit standa frammanfyri somu trupulleikum sum okkara grannalond. Vit eru sogin inn í altjóða meldurin. Hetta er ikki ein støða, sum eggjar til tað, sum ein vælkendur tingmaður plagdi at kalla strutsapolitikk. Her hjálpir ikki at stinga høvur í sand, men her verður brúk fyri, at øll taka ábyrgd og sýna áhuga.

**Sosialurin**

## Hvussu verja vit Føroya Banka, nú verjarnir svíkja?

**JENIS AV RANA**
løgtingsmaður



Grundarlagið undir at geva burtur felags ogn føringa, Føroya Banka, varð lagt í einum døgurðatíma 2. mai 2006. Tá royndi Løgtingið at krógva avgerandi viðgerðina av at privatisera bankan (les: at geva ogn tína til nakrar fáar), við at hava triðju løgtingsviðgerð meðan flestu føringar lurtaðu eftir tíðindunum á døgurða. Eg metti hesa umvendu Robin Hood gerðina skeiva at vera, atkvøddi ímóti og kunnaði teg sum eigara um hetta í lesarabrævi í bløðunum.

Nú ressast nakrir av jasigara politikkarunum við, júst sum eg væntaði, valið nærkast jú. Teir látast sum fyritreytir eru broyttar - men so er ikki. Tí tað var júst tað, ið nú hendir, eg ávaraði ímóti og vegna tess atkvøddi eg nei til privatiseringina (gevanina av ogn allra til fáar at ríka seg av). Eg vísti á søguna, sum upp til fleiri ferðir váttar, at tá væl gongur, vilja privatir eiga fíggjarkervið, men tá táttar í, og útlit eru fyri tapi, tá má landskassin – t. v. s. tú og eg - taka um endan. Men so títt og knapt bankin gevur pening av sær aftur til tín, mín og landskassan, ja so er einki mark fyri argumentum at geva hann (ogn allra) til teir fáu at ríka seg av, men bert til næsta skrædlið kemur, tá mást tú aftur gjalda veitslu teirra fáu.

Og júst so er støðan í dag, tað eg ávaraði móti tykist henda. Nú bankin gevur av sær, bæði í skatti og vinningsbýti, til felags kassa okra, landskassan, tykist alt benda á, at ætlanir eru um at geva hann, tína og mína ogn, til útvaldar - fyri brotpart av tí, hann er verdur. Harafturat tykist eisini verða greitt, at fleiri hjálparar ganga klárir at skúma róman.

Umráðandi er at steðga hesum. Men hvussu?

Politikkarar tykast ikki sinnaðir at hjálpa - spurningurin er tí, um ikki eitt fólksligt mótmæli, t. d. sum undirskiftir, átti at farið í gongd fyri at steðga ábyrgdarloysinum? Er onkur, ið hevur hug at samskipa slíka verju av bankanum, ella hevur tú kanska aðra loysn?

## Hví krógvar samgongan uttanríkis-politikkin fyri løgtinginum?

**HERGEIR NIELSEN**



Á Kyndilsmessu í ár varð løgmaður spurdur eftir einum uttanríkispolitiskum orðaskifti á tingi, og svaraði hann tá, at málið var komið til fínpussingar, og var ávegis í tingi.

Nú summarmáli er í hondum og tingssetan við at enda, sæst einki útkast til nakað uttanríkispolitiskt orðaskifti, hvørki grovtella fínpussað, og heldur einki sæst til nakran løgmann, sum umsitur hesi viðurskifti.

Tvørturímóti, so er løgmaður burturstaddur, nú løgtingið hevur mest at gera, og næstseinastu munnligu spurningarnir eru á skrá.

Eitt uppskot Tjóðveldisfloksins fyri einum ári síðan, um at søkja limaskap í EFTA, varð eftir áheitan frá løgmanni forðað í at fáa í viðger í uttanlandanevndini og doyði tí stráðdeyðan á tingi.

Annað uppskot Tjóðveldisfloksins nú um dagarnar, um at taka ræði á uttanríkispolitisku viðurskiftunum, varð eftir áheitan frá heimastýrisflokkunum í formansskapinum forðað í at fáa nakra viðger yvirhøvur, og doyði tí eisini stráðdeyðan á tingi.

Í triðja lagi hevur so sjálvur løgmaður ligið á lyftunum og møguleikunum fyri at leggja nakað uttanríkispolitiskt orðaskifti til tingsins viðger alt samgonguskeiðið.

Tráðspurdur á Kyndilsmessu svaraði løgmaður, at framløgan til uttanríkispolitiska orðaskifti var til fínpussingar, og fyrsta dagin varð borin niðan í tingið.

Nú setan er um at enda, einki mál sæst hava verið á dagsskrá í Tinganesi, og løgmaður ongari aðrari frábóðan er komin við, verður roknað við, at árligu lyftini um hetta orðaskiftið verða brotin enn eina ferð.

Kortini, so hevur Tinganes boðað frá, at varaløgmaður røkir heimildir løgmans, meðan løgmaður er burturstaddur, og verður varaløgmaður tí spurdur, um hann kann kunnað løgtingið um uttanríkispolitisku støðu Føroya í løtuni, Evropastrategiirnar og útlitini fyri ætlaða limaskapi okkara í EFTA/EBS?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.